LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Tinganes, 24. februar 2022
Málnr. 22/03977

# Útbjóðing av uppgávum viðvíkjandi flagging í Tinganesi

Løgmansskrivstovan vil við hesum bjóða út uppgávuna at hava flagging í Tinganesi um hendi.

Uppgávan er í høvuðsheitum lýst í "kunngerð nr. 52 frá 23. apríl 2003 um flagging frá landsins bygningum", sum er hjáløgd. Til kunningar er eisini lógin hjáløgd, t.e. "løgtingslóg nr. 42 frá 17. juli 1959 um flaggið, sum broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 29. desember 1998".

## Uppgávan

Í Tinganesi eru tvær flaggstengur, t.e. flaggstongin út á nesinum og flaggstongin á Bakkapakkhúsinum, og sambært kunngerðini um flagging frá landsins bygningum verður flaggað soleiðis:

Flaggstongini úti á nesinum:

- Flaggað verður hvønn dag við Merkinum, t.v.s. 365 flaggingar um árið, skotár tó 366 flaggingar.
- Flaggað verður altíð við tí stóra flagginum (hevur hóskandi stødd til flaggstongina), um veðrið loyvir hesum.
- Um tað tó verður mett, at veðrið ikki er til vildar til stóra flaggið, verður flaggað við einum minni flaggi.

Flaggstongin á Bakkapakkhúsinum:

- Flaggað verður sambært flaggdøgum í kunngerðini, har
  - 18 flaggingar eru við Merkinum og
  - 8 flaggingar eru við fløggum hjá norðurlendsku brøðratjóðum í sambandi við teirra tjóðar-/flaggdag.
- Umframt hetta kunnu fleiri flaggingar (ella onnur frávik) koma fyri eftir nærri boðum frá Løgmansskrivstovuni.

Uppgávan fevnir eisini um vanligt viðlíkahald viðvíkjandi línum og fløggum, har uppgávueigarin vegna Løgmansskrivstovuna keypir og varðveitir viðkomandi fløgg, línur við meira. Løgmansskrivstovan rindar og eigur fløggini sum flaggað verður

Tinganes • FO-100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel: +298 306000 • Fax: +298 306015 • e-mail: lms@lms.fo • www.lms.fo

við og endurrindar uppgávutakara útreiðslur í samband við innkeyp. Útreiðslurnar skulu vera skjalprógvaðar.

## Tilboðsgevari / uppgávueigari

Einstaklingar, fyritøkur og fyritøkur undir stovnan kunnu bjóða uppá uppgávuna.

Tilboðsgevari skal vera til reiðar at taka uppgávuna á seg frá og við sunnudegnum 1. mai 2022.

Sáttmáli verður gjørdur um uppgávuna. Sáttmálin kann sigast upp av báðum pørtum við 1 mánaðar freist at fara úr gildi tann seinasta í einum mánaði.

Løgmansskrivstovan og uppgávueigari hava støðufund uml. annan hvønn mánað, har m.a. møguligir ivaspurningar verða umrøddir. Hesin fundur kann vera umvegis telefon. Uppgávueigari sendir í hesum sambandi hvønn mánað yvirlit til Løgmansskrivstovuna ið vísir um trupulleikar hava verið at fáa flaggið upp ella niður rættstundis.

## Tilboðið

Biðið verður um tilboð, har greitt gongur fram, hvør er tilboðsgevari, sum inniheldur samskiftisupplýsingar (telefonnummar og teldupostadressu), umframt lýsing sum umfatar:

- **Royndir:** Lýsing av møguligum royndum við líknandi uppgávum ella øðrum sum gevur góðar førleikar at røkja uppgávuna. Fyritøkur kunnu nevna royndir sum fyritøkan hevur, ella fólk sum eru í starvi hjá fyritøkunum hava.
- **Veitingartrygd:** Upplýsing um, hvussu tilboðsgevari ætlar at tryggja, at uppgávan kann loysast hvønn dag alt árið,
    - Fyritøkur kunnu nevna, hvørjir persónar ætlanin er skulu røkja uppgávuna,
    - Einstaklingar skulu í minsta lagi upplýsa ein persón sum hevur váttað at vera avloysari eftir tørvi,
- **Prísur:** Gjald u/MVG sum Løgmansskrivstovan skal rinda fyri uppgávuna pr. dag:
    - Prísur fyri ein dag har einans skal flaggast við Merkinum úti á Tinganesi
    - Prísur fyri ein dag har flaggast skal bæði úti á Tinganesi og á Bakkapakkhúsinum

Freistin at geva tilboð er týsdagin 22. mars 2022 kl. 14. Tilboð skal sendast til lms@lms.fo.

## Avgerð: Stigaskipan

Avgerðin um hvør fær uppgávuna verður avgjørt við stigaskipan har møguligt er at fáa upp til 100 stig soleiðis:

- **Royndir kunnu geva upp til 20 stig**, sum verða givin út frá teimum royndum sum tilboðsgevari greiðir frá í tilboðstilfarinum. Fleiri tilboðsgevarir kunnu fáa fult stigatal.
- **Veitingartrygd kann geva upp til 20 stig**, sum verður givið út frá teimum upplýsingum, sum tilboðsgevari greiðir frá í tilboðstilfarinum. Fleiri tilboðsgevarir kunnu fáa fult stigatal.
- **Prísur kann geva upp til 60 stig**. Hesi stig verða givin soleiðis, at øll tilboð verða roknað um til kostnað fyri eitt ár. Síðani fær bíligasta tilboð 60 stig, og tilboð sum eru hægri fáa stig í øvugtum lutfalli av prísinum í mun til bíligasta tilboð. Sí roknidømi í skjali 1.

Tilboðsgevari sum samanlagt fær flest stig fær bjóðað uppgávuna at standa fyri flagging í Tinganesi frá 1. mai 2022.

Miðað verður eftir, at allir tilboðsgevarar í seinasta lagi dagin eftir freistina at lata inn tilboð fáa at vita hvussu mong stig teirra tilboð hevur fingið umframt hvussu mong stig vinnandi tilboð hevur fingið.

Endalig avgerð um hvør tilboðsgevari fær uppgávuna verður eftir ætlan tikin fríggjadagin 25. mars 2022.

## Gjald og avrokning

Gjaldið sum vinnandi tilboðið fevnir um verður galdandi í eitt ár. Eftir hetta verður gjaldið javnað, so tað fylgir gongdini í tímalønini í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Væntandi verður fyrsta javning av gjaldinum sostatt frá 1. mai 2023.

Avroknað verður mánaðarliga sambært talgildari rokning, sum uppgávueigari skrásetir ígjøgnum tokningaportalin hjá Gjaldstovuni.

Uppgávueigari sum er einstaklingur skal hava ella fáa sær v-tal.

## Spurningar

Hava tygum spurningar, eru tygum vælkomin at senda teldupost til lms@lms.fo. Roynt verður at svara innan fyri 48 tímar.

Freist at seta spurningar um hetta útboð er mikudagin 16. mars 2022 kl. 14.

Allir spurningar og svar verða løgd út á Keypsportalin sum skjal til hetta útboð. Spurnngar og svar verða anonymiserað áðrenn tey verða løgd út.

**Skjal 1: Dømi um útrokning av stigum fyri prís**

Til útrokningina av árligum kostnaði verður roknað við 365 døgum í árinum, har flaggast skal hvønn dag á Tinganesi. Eisini verður roknað við flagging á Bakkapakkhúsinum sambært flaggkunngerðini, t.e. 18 ferðir við Merkinum og 8 ferðir við fløggum hjá norðurlendskum brøðratjóðum, umframt fimm flaggingum eftir boðum frá Løgmansskrivstovuni, íalt 31 ferðir flagging á Bakkapakkhúsinum.

Í hesum roknidømi eru tvey tilboð komin inn:

Tilboð 1: Ein dag har flaggast skal við einum flaggi 295 kr, og ein dag har flaggast skal við tveimum fløggum 395 kr

Tilboð 2: Ein dag har flaggast skal við einum flaggi 410 kr, og ein dag har flaggast skal við tveimum fløggum 600 kr

Tilboð 1 í árligum kostnaði:

18 + 8 + 5 = 31 dagar við tveimum fløggum: 31 x 395 kr = 12.245 kr

365 – 31 = 334 dagar við einum flaggi: 334 x 295 kr = 98.530 kr

Samanlagt 110.775 kr

Tilboð 2 í árligum kostnaði:

31 dagar við tveimum fløggum: 31 x 600 kr = 18.600 kr

334 dagar við einum flaggi: 334 x 410 kr = 136.940 kr

Samanlagt 155.540 kr

Niðurstøða:

Tilboð 1 er bíligast og fær 60 stig.

Tilboð 2 fær $\left(\frac{110.775\ kr}{155.540\ kr}\right)$ x 60 stig = 42,7 stig.